# Harður dystur á borðinum

**Borðtennis**

Kjartan Eli Hentze
Peter Niclasen
Birgir Carlsson
Ragnar Egilsson
Paula Eikhólm
Maria Chun Nielsdóttir
Marin í Dali
Rakul V. Magnussen




*Borðtennislandsliðið vann tvær bronsukrónur á seinastu leikunum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Borðtennisspælararnir ásanna, at tað verður sera trupult at vinna heiðursmerki í liðkappingini, men teir vóna at fáa góð úrslit í øðrum kappingum**

BORÐTENNIS
*Eyðun Klakstein*

Átta føroyskir borðtennisspælarar verða við á Oyggjaleikunum hesaferð, og býtið millum kynini er púra javnt.

Fólkini, sum varða av borðtennisítróttini, eru greið yvir, at tað verður sera trupult at vinna heiðursmerki í liðkappingini.

– Vit stíla eftir at sleppa at spæla um 5. pláss. At vinna heiðursmerki í liðkappingini krevur sera nógv, og har kunnu vit neyvan verða við, sigur Peter Niclasen, sum var annar av føroysku borðtennisspælarunum, sum vann heiðursmerki á seinastu Oyggjaleikunum.

Hann vann saman við Kjartan Eli Niclasen bronsu í tvímansleikinum, meðan Kjartan Eli somuleiðis vann bronsu í einstaklingakappingini. Hetta vóru tvey frálík úrslit.

### Helst seedaðir

Í liðkappingini skulu Føroyar spæla ímóti Gotlandi, Guernsey, Grønlandi, Orkneyoyggjunum og Álandi. Vinnarin av bólkinum kemur beinleiðis í finaluna, meðan hinar oyggjarnar skulu spæla um plaseringar móti oyggjunum í hinum bólkinum.

Heiðursmerkini á seinastu Oyggjaleikunum gera, at Kjartan Eli og Peter helst verða seedaðir hesaferð, og tað kann geva teimum yvirkomiliga mótstøðu tíðliga í kappingini, men tað eru eisini onkrir ókendir faktorar.

– Bermunda og Rhodos eru við fyri fyrstu ferð, og vit vita ikki, hvørja styrki hesar oyggjar hava. Tað kann saktans verða, at góðir spælarar fara at umboða tær oyggjarnar, sigur Peter Niclasen.

Føroysku borðtennisspælararnir hava verið eitt sindur spjaddir í fyrireikingini. Kjartan Eli Hentze og Paula Eikhólm hava vant í Greve, har landsliðsvenjarin, Preben Larsen, eisini er venjari, og Maria Chun Nielsdóttir hevur verið í Norwich seinasta árið.

Men nú verður øll orka løgd í eitt gott úrslit á Guernsey.

# Fjølmiðlarnir fylgja væl við

**Føroysku fjølmiðlarnir senda nógv fólk avstað til Oyggjaleikirnar, og á Guernsey fáa leikirnir sína egnu avís og útvarpsstøð**

MIÐLAR
*Eyðun Klakstein*

Fjølmiðlarnir spæla ein týðandi leiklut, tá ið stórar ítróttarkappingar verða hildnar, og soleiðis er eisini á Oyggjaleikunum.
Fjølmiðlafólk koma úr øllum ættum fyri at fylgja við, hvussu tað gongst umboðnum fyri teirra oyggjar í stóru kappingini.
Føroysku fjølmiðlarnir senda nógv fólk avstað, og bæði útvarp, sjónvarp og bløð fara at fylgja við, hvussu føroysku ítróttarfólkini fara at standa seg millum kappingarneytarnar.

Sum um tað ikki var nóg mikið, at alskyns fjølmiðlar fylgja við í leikunum, so hava fyriskipararnir á Guernsey hesaferð gjørt av, at ein serlig útvarpsrás og ávís skulu dekka kappingarnar.

### Ópartískir miðlar

Serliga Oyggjaleikablaðið verður hvønn dag borið út saman við Guernsey Press, og í hesum blaði verður alt at frætta um leikirnar. Blaðið verður 24 litsíður til støddar hvønn dag.

Ein útvarpsrás fer eisini at senda tilfar um Oyggjaleikirnar døgnið runt, meðan leikirnar eru.

– Hesir miðlar skulu ópartískir fylgja við kappingunum, og tað snýr seg ikki bara um at fanga andan í kappingini, men eisini at vera upplýsandi og rættir, sigur Stuart Falla, sum er formaður fyri fyrireikingarnevndini á Guernsey.

Guernsey Press, sum er lokala blaðið, fer at fylgja við leikunum og serliga teimum lokalu ítróttarfólkunum, men tá ið tað kemur til serliga Oyggjaleikablaðið, sum verður borið út saman við blaðnum, verður umrøðan uttanveltað.

– Oyggjaleikablaðið fer at umrøða leikirnar við myndum og greinum, og vit fara eisini at hava yvirlit yvir kappingarnar, so fólk fáa at vita, hvat gongur fyri seg nær og hvar, sigur Richard Digard, blaðstjóri á Guernsey Press.

Útvarpsrásin fer at senda á FM, men eisini føroyingar kunnu eisini fylgja við umvegis internetið.



*Jákup Mørk, blaðmaður á Sosialinum, og Tórður Mikkelsen, reportari í Sjónvarpinum, fylgja við einum avgerandi flogbóltdysti.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



**UTTAN ÚR HEIMI**

# Tangaskip fekk maskinskaða 10 fjórðingar úr landi

**Norðmenn og serliga fólk í Norðurnoregi hildu ondini mikudagin, tá eitt russiskt tangaskip við 102.000 tonsum av olju í tangunum fekk maskinskaða bert góðar 10 fkórðingar úr Nordkap.**

OLJUFLUTNINGUR
*Árni Joensen*

Í hálvan fimta tíma rak tað 106.000 tons stóra russiska tangaskipið "Moscow" ímóti landi, eftir at høvuðsmotorurin var steðgaður.

Skipið var bert ellivu fjórðingar úr Nordkap, tá motorurin steðgaði um 10-tíðina fyrrapartin, og vindur og streymur bóru skipið ímóti landi. Danski umboðsmaðurin hjá russiska reiðarínum bað norsku vaktar- og bjargingartænastuna um at fáa ein sleipibát at hjálpa skipinum, men eingin norskur sleipibátur var nær námind russiska skipinum. Ístaðin fingu fleiri skip hjá sjóverjuni boð um at sigla ímóti "Moscow", sjálvt um tað var greitt, at tað fór at taka tíggju tímar, áðrenn tað fyrsta verjuskipið kundi koma til russiska skipið.

Men eydnan var við russum og norðmonnum. Klokkan hálvgum trý boðaði skiparin á "Moscow" frá, at teir høvdu fingið motorin í gongd, og at skipið helt leiðina fram til Rotterdam sum ætlað.

### Ávaring

Norskir myndugleikar og umhvørvisverndarfelagsskapir eru á einum máli um, at tilburðurin uttan fyri Nordkap mikudagin eigur at verða tikin sum ein álvarssom ávaring. Russar eru í ferð við at útbyggja oljuhavnina í Murmansk, og í framtíðini fara nógv stór tangaskip at sigla regluliga fram við norðurnorsku strondini fullfermd við olju. Samstundis hava norsku myndugleikarnir gjørt av at fara undir oljuleiting í Barentshavinum.

Fleiri norskir politikarar kravdu í gjár, at myndugleikarnir skulu hava minst ein sleipibát tøkan í Norðurnoregi alt árið. Umhvørvisverndarfelagsskapurin Bellona heldur, at tað er alt ov lítið við einum sleipibáti, og harafturat krevur felagsskapurin, at tangaskip skulu fáa boð um at halda seg minst 35 fjórðingar úr landi. Sum er kunnu tey koma inn á 12 fjórðingar.

Bæði myndugleikarnir og umhvørvisverndarfelagsskapirnir vita, hvat kundi hent, um tilburðurin mikudagin hendi í illveðri á hávetri, og hvørjar avleiðingar ein hugsandi vanlukka kundi fingið fyri umhvørvið við Norðurnoreg og í Barentshavinum.

Mikudagin var gott veður við Nordkap, men tað er ikki altíð.

# Sellafield verður ikki stongt

*Sellafield-verkið verður ikki stongt, sigur Tony Blair*



**Bretska stjórnin fer ikki at steingja kjarnorkuendurvinningarverkið Sellafield. Tað sigur Tony Blair.**

SELLAFIELD
*Árni Joensen*

Orðaskiftið var um tað umstrídda Sellafield-verkið í bretska Undirhúsinum fyrradagin, eftir at ein norðurírskur tinglimur hevði sagt, at írar hava prógv fyri, at útlát frá verkinum dálkar Írska Havið.

Tingmaðurin kravdi, at verkið verður stongt, men so verður ikki. Tony Blair, forsætisráðharri, svaraði, at bretsku myndugleikarnir halda allar altjóða reglur í sambandi kjarnorkuendurvinning, og hann legði afturat, at alt tos um dálking frá verkinum hevur víst seg ikki at hava hald í veruleikanum.

Írar og norðmenn krevja, at Sellafield-verkið steðgar útlátinum av evninum Tc-99, tí tað dálkar Írska Havið og havleiðirnar fram við norsku strondini. Ætlanin var, at umhvørvismálaráðharrarnir úr Noregi og Bretlandi skuldu umrøða málið fyrr í vikuni, men bretar avlýstu fundin.

## Vænta framburð á KT-økinum

Nógvar KT-fyritøkur hava havt stórar trupulleikar , men nú bendir ein kanning í Danmark á, at har er vend um at koma í.

Kanningin, sam stovnurin Greens hevur gjørt fyri blaðið Børsen, vísir, at umleið ein triðingur av teimum donsku fyritøkunum ætla at gera munandi íløgur á KT-økinum teir næstu tólv mánaðarnar. Víst verður á, at hetta hendir, júst sum vinnulívið er í einum aldudali, men at tað er júst í slíkum tíðum, at fyritøkurnar leggja størri dent á effektivitetin og sínar edv-skipanir.

Í kanningini hjá Greens sæst eisini, at meginparturin av teimum ætlaðu íløgunum á KT-økinum skal nýtast til at skifta gamla útgerð út, meðan ein triðingur av íløgunum kemst av sparingum. Sum er arbeiða 92.500 danir í KT-vinnuni, og árligi umsetningurin hjá vinnuni er 190 milliardir krónur.

## Njósnast ímóti sendistovum

Svenska uttanríkisráðið sigur seg vera sannført um, at í fleiri londum verður dúgliga njósnast ímóti teimum svensku sendistovunum. Tað sæst millum annað í frágreiðingum frá fleiri sendistovum.

Eitt nú sigur svenska sendistovan í sýriska høvuðsstaðnum Damaskus, at har hevur almenna trygdartænastan eftir øllum at døma neyvt eftirlit við teimum, sum arbeiða á sendistovuni, og sendistovan vil eisini vera við, at sýrisku myndugleikarnir lurta eftir telefonsamrøðunum hjá sendistovuni. Tað sama sigur sendistovan í kubanska høvuðsstaðnum Havanna.

Eitt yvirlit hjá uttanríkisráðnum í Stockholm, sum blaðið Aftonbladet hevur fingið fatur á, vísir, at skilið er tað sama á svensku sendistovunum í Turkalandi, Russlandi, Pakistan, Kina, Iran, Ísrael, Saudiarabia, Pólandi og fleiri øðrum londum.

## Krevur framvegis offur

Hóst nógv ár eru liðin, síðani kríggið í Vietnam endaði, krevur tað enn tann dag í dag síni offur.

Mánadagin doyði ein trettan ára gamal drongur, tá ein granat frá krígnum brast í landspartinum Quang Nam. Tveir aðrir dreingir, níggju og tólv ára gamlir, vórðu løstaðir. Myndugleikarnir siga, at teir tríggir dreingirnir sótu hjá neytum, tá teir komu fram á granatina.

Týsdagin doyði ein 16 ára gamal drongur, tá ein gomul bumba brast. Hesin tilburðurin var í landspartinum Yen Thanh. Átta aðrir dreingir, sum eru millum 13 og 17 ár, fingu skaða. Undir Vietnam-krígnum tveittu amerikanarar nógvar bumbur og granatir Quang Nam- og Yen Thanh-landspørtunum.

## Dansur í rættinum

Myndugleikarnir í amerikanska statinum North Carolina gjørdu fyri trimum árum síðani av at nokta teirri tá 55 ára gomlu Rebeccu Willis at sýna fram dans á almennum støðum, tí hon var ov eggjandi í sínum dansi, samstundis sum skjúrtið, sum hon nýtti til dansin, var í so stutt.

Men Rebecca Willis sýtti fyri at góðtaka avgerðina hjá myndugleikunum og fór í rættin við málinum. Har kom Max O. Cogburn, dómari fyrr í vikuni til ta niðurstøðu, at avgerðin hjá myndugleikunum var eitt brot á rættindini hjá tí einstaka og sostatt eisini á rættindini hjá dansikvinnuni.

Nú sleppur tann 58 ára gamla Rebecca Willis aftur á dansigólvið at vísa síni kynstur. Hon er líka eggjandi sum fyri trimum árum síðani, og skjúrtið er líka stutt sum tá, skrivar blaðið Citizen Times.